


rkvøldið á horninum millum Korsgade og Griffenfeldsgade á Nørrebro í Keypmannahavn

Mynd: Polfoto

Hesin ótti verður undirbygdur av áðurnevndu útsagnum hjá Jørn "Jønke" Nielsen, umframt at danskir miðlar eisini vísa til kjakið á heimasíðuni hjá Hells Angels, har tónin er rættiliga ráur.

Rokkararnir fáa heilsanir frá fólkum, ið rópa seg vanligir danir, og millum annað ynskja rokkarunum góða eydnu í stríðnum móti hesum yvirgangsmonnunum.

**Taka ein dag í senn**

Veruleikin er eisini ógvuliga ráur. Tað má Jens Petur Weihe ásanna. Sambært systurdóttir sínari minnist hann alt tað, sum hendi á horninum millum Korsgade og Griffenfeldsgade leygarkvøldið.

Jens Petur Weihe hevur eisini tosað við løgregluna, um tað, ið fór fram. Nú hann er sloppin av intensivu deild skal hann aftur tosa við løgregluna. Í gjárkvøldið var ógreitt nær hetta verður, tí enn situr skelkurin so mikið fast í Jens Peturi Weihe.

– So í løtuni taka vit bara ein dag í senn, segði Linda Weihe, systurdóttir Jens Petur Weihe, í gjárkvøldið.

Á Nørrebro taka íbúgvarnir eisini bara ein dag í senn. Hetta eru eisini skilabestu ráðini, verður sagt, tí eingin veit hvat hvør dagur hevur at bjóða.

Í gjármorgunin varð maturin til tey gomlu á Nørrebro borin út við politieskort, tí tey, ið vanliga bera matin út, hava verið hótt av innflytarabandum.

Í gjárkvøldið valdu fleiri mentanarstøð at steingja, tí tey ikki vildu bjóða starvsfólkunum at arbeiða um kvøldið, tá støðan er sum hon er.

Í dag hittast Hanne Bech Hansen, løgreglustjóri, og Brian Mikkelsen, løgmálaráðharri, har tey skulu tingast um trupulleikarnar. Men hvat morgindagurin hevur við sær, veit eingin. Heldur ikki Hanne Bech Hansen ella Brian Mikkelsen.

## Fakta

| | |
|---|---|
| Skottilburðir higartil í 2009: | 14 |
| Skottilburðir í 2008: | 61 |
| Skottilburðir í 2007: | 22 |

*Keldur:*
*DR*
*TV2*
*Politiken*
*Berlingske Tidende*
*Ekstra Bladet*
*www.hells-angels.dk*